


# Skipasmiðjan á Skála b

**– Vit eru 75 mans til arbeiðis á skipasmiðjuni, men kundu saktans havt einar 30 mans aftrat, serliga sveisarar og maskinsmiðir. Vit hava ikki søkt eftir fólki, men hava lænt fólk frá øðrum verkstøðum, sum vit hava gott samstarv við, sigur Dánjal Andreassen, umsitingarleiðari**

HANDVERKSVINNA
*Orð & myndir:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Skipasmiðjuni á Skála hava teir úr at gera, og soleiðis, sum út sær í løtuni, verður eisini nógv at gera á skipasmiðjuni teir næstu mánaðirnar.

Skip verða longd, og skip verða bygd um til tungolju. Onnur eru til árligt eftirlit, og uppaftur onnur eru til viðlíkahald og neyðugar umvælingar.

Bæði við bryggjukantin, í dokkini og uppi á landi eru menn til arbeiðis.

Stórt og umfatandi arbeiði verður gjørt fyri brennistøðina hjá IRF á Hagaleiti, og stórt arbeiði skal gerast fyri KOB-brennistøðina á Hjalla.

Talan er í fyrsta lagi um skering, sveising og levering av eini 120-130 tonsum av stáli, sum skal verða við til at reinsa roykin, sum kemur frá brennistøðunum.

Hetta er gomul krøv, sum nú skulu fáast frá hondini á báðum brennistøðunum.

### Letur væl at

– Dokkin, sum er tann einasta í Føroyum, er at kalla fult bookað fram til august mánaða, sigur Dánjal Andreassen, sum er umsitingarleiðari á Skipasmiðjuni á Skála.

Hann letur væl at, nú so nógv er at takast við á skipasmiðjuni, men við tí fólki, sum tókt er til arbeiðis, krevja hesi arbeiði góða og holla stýring og dugnalig arbeiðsfólk.

– Jú, eg haldi, vit kunnu siga, at tað sum heild gongur væl í hesi vinnu í løtuni, sigur Dánjal Andreassen.



*Dánjal Andreassen er umsitingarleiðari á Skipasmiðjuni á Skála*

### Tørva arbeiðsmegi

– Vit kundu saktans brúkt einar 30 mans aftrat, soleiðis sum gongdin er, serliga sveisarar og maskinsmiðir, sigur hann.

Spurdur, sigur umsitingarleiðarin, at skipasmiðjan hevur ikki søkt eftir fólki, men teir hava spurt seg fyri hjá øðrum verkstøðum.

– Men líkt er til, at allir hava nóg mikið at gera.

Dánjal sigur, at skipasmiðjan hevur gott samstarv við onnur verkstøð, og tí hevur smiðan stundum kunnað lænt fólk aðrastaðni, tá ið mest hevur verið at gera.

– Vit hava soleiðis eisini lænt nakrar av okkara monnum út, tá ið aðrir hava havt brúk fyri fólki, og vit hava kunnað umverað onkran mann her hjá okkum.

### Leingingar

Tá ið Sosialurin vitjaði á Skála seinast í farnu viku, stóðu systurskipini, Skálafossur úr Vestmanna og Hansa Maria av Toftum, uppi á bedingini.

Teir eru báðir longdir við 1,80 metrum, sum er sett uppi umleið miðskips.

Hesi skipini, sum royna á landleiðini um sumrarnar, eru teknaði á Tórshavnar Skipasmiðju, men skrokkarnir eru bygdir eftir føroysku tekningunum í Pólandi.



Skrokkarnir vórðu sleipaðir heim úr Pólandi, og síðan vórðu skipini smíðaði liðug og riggaði til á Tórshavnar Skipasmiðju.

– Hetta arbeiði hevur gingið væl. Vit bygdu sektiónirnar, sum skuldu setast upp í skipini, áðrenn skipini komu higar og vórðu skorin sundur. Ætlandi skuldu skipini verða liðug longu eftir trimum vikum síðsta mikudag, men veðrið hevur tarnað okkum eitt sindur.



*Stelkur er nú um at verða liðugur eftir herviliga eldin fyrr í ár. Nú verður kryvjimaskina sett í systurskipini, Stelk og Bak hjá P/F Beta*



*Rækjuskipið Napoléon, sum leirvíkingar nú eiga, verður umbygdur til tungolju, samstundis sum skipið verður sett í stand*